**Sørvágs kommuna**
**FR-380 Sørvágur · Føroyar**

Tlf. 32004 - 33122
Telefax 009 298 32952

Sørvágur 30.12.1995

# Kunningarskriv 1995



**Triðja** árið hjá sitandi bygdaráði verður um skamma stund lagt aftur um, og á gáttini til nýggja árið fara vit sum undanfarin ár at kunna borgarar okkara um gongdina í 1995.

**B**ygdaráðið hevur havt fimtan fundir í 1995, og viðgjørt umleið áttati mál- á leið tað sama sum í 94 - og hevur hetta verið umsóknir um byggiloyvir - matr. sundurbýti - stuðul - umfigging o.a.

**Eitt** tað fyrsta málið, íð var viðgjørt í 95 var figgjarliga ómegdin SÍ var komið í, í samband við graslíkisvøllin. Sum øllum kunnugt keypti SÍ graslíki á vøllin í 1991. Hetta var uppundir tær vánaligu tíðirnar, vit nú endaðu í, og var tí ógvuliga trupult at fáa figging til vega, hóast hetta mundi vera bíligasti vøllur. Tað eydnaðist ikki at fáa bankafigging, og endin var, at avtala um 2,7 mill. fekst frá donskum leasingfelag, - tó við teirri treyt at kommunan veðhelt. Gjaldsavtalan hvørt ár var umleið 240.000 kr. alt eftir marknaðarrentuni + 200.000 kr. í stuðli frá kommunui. SÍ megnaði sínar skyldur í 91, 92 og 93, men so bognaði ryggurin, og SÍ mátti leggja kongin. Av játtaða stuðlinum uppá 200.000 kr. fekk SÍ tessvegna bert helvtina í 94.

**A**ftaná drúgvar samráðingar millum SBK-invest og SÍ, og síðani Sørvágs kommunu og danska leasingfelagið eydnaðist tað í juli mánaði at gera eina avtalu um eitt eingangsgjald fyri at sleppa burturúr sáttmálanum, - skuldin var nú 2.296.805 kr., og endaligi undirskrivaði sáttmálin millum Sørvágs kommunu og SBK-invest ljóðaði uppá 1.650.000 kr., ein niðurskurður uppá 646.805,43 kr.

**Til** útgjaldingar av teimum 1.650.000 kr. hevur SÍ goldið 288.000 kr., og kommunan ábyrgdast fyri restini.

So varð farið í Føroya Banka at fáa 1,2 mill. í láni fyri at klára avtaluna, og aftaná tógvið "manerer" eydnaðist hetta, - tó ikki uttan treytir. Eitt veðhald í gamla flakavirkinum uppá 1,5 mill. skuldi umleggjast til lán.

Hetta veðhaldslánið kom undir umfiggingina av kommunuskuldini, meðan SÍ lánið er uttanfyri, og skal afturgjaldast eftir trimum árum við 475.000 kr. hvørt árið.

Samlaða upphæddin kommunan yvirtók vøllin fyri var sostatt 1.650.000 kr.+ 225.000 kr. (samlaða rentan av 1,2 mill.) = 1.875.000 kr. - 288.000 kr. (gjaldið frá SÍ) - 300.000 kr. (stuðul frá Sørvágs kommunu - 100.000 kr. í 94 0g 200.000 kr. í 95) = 1.287.000 kr.

Henda upphædd verður skuldskrivað SÍ, og møguligur játtaður stuðul (fyri 96 150.000 kr.) verður ikki fluttur SÍ, fyrrenn skuldin er niðurskrivað á 0, og eisini stendur SÍ í boði at gjalda inn fyri at minka um skuldina.

Sørvágs kommuna kemur at hava høvuðsábyrgdina av vøllinum, og skrivlig avtala verður gjørd millum partarnar um skyldur og krøv. SÍ ber allar útreiðslur viðvíkjandi viðlíkahaldi o.ø. í samband við vøllin, men fær kommunan útreiðslur , ið standast av, at SÍ møguliga ikki heldur avtaluna innanfyri ynskiligt mark, mótroknar kommunan hesar, soleiðis at enn fleiri ár ganga, áðrenn SÍ sær fram til at fáa beinleiðis stuðul frá Sørvágs kommunu.

Á síðsta aðalfundi hjá SÍ var vald nýggj nevnd og í henni sita: Jákup á Stongum, form., Rasmus Niclasen og Eivin Jacobsen.

Viðvíkjandi arbeiði hevur í 95 gingist framá frá í 93 at vera steindeytt og gongd kom á í 94, og her verður serliga sipa til arbeiðsgongdina á havnalagnum. Bygdaráðnum kunnugt verður har arbeitt við ætlanum, sum fara at skapa nøkur arbeiðspláss aftrat og meira støðugt arbeiði, og hetta fegnast vit øll um.

Viðvíkjandi leigusáttmálanum millum Sørvágs kommunu og Føroya Fiskavirking er at siga, at bygdaráðið hevur samtykt at siga leigusáttmálarnar upp, og hevur kunnað Føroya Fiskavirking og veðhavararnar, ið hava tinglýst veð á ognunum sambært tingbókini. Í svarskrivi frá Føroya Fiskavirking dagsett 11.12.95 verður sagt, at arbeiði hevur verið á virkinum í leigutíðarskeiðnum, og teir tí meta, at leiguavtalan við kommununa er yvirhildin og tessvegna ikki góðtaka uppsøgnina. Hartil er málið komið higartil, men arbeitt verður víðari við hesum í nýggja árinum.

Í kunningarskrivinum 94 var sagt frá, at Felagskommunan hevði sett eina oljunevnd at "kanna" eina komandi oljuvinnu. Henda nevnd hevur gjørt eitt stórt og dygdargott arbeiði, og 27. mei 1995 handaði hon Felagskommununi eitt skrivligt, stórt og væl úr hondum greitt álit í trimum pørtum við frágreiðing og tilmæli til eina komandi

oljuvinnu. Sambært hesum tilmæli hevur Felagskommunan í 1996 avsett 210.000 kr. til oljuvinnu.

Fíggjarætlanin fyri 1996 hjá Felagskommununi er uppá 423.840 kr., harav 100.000 kr. verða goldnar yvir likviditetin og 323.840 kr. at býta millum kommunurnar. Vanliga mannagongdin hevur verið, at goldið er í mun til skattskyldugu inntøkuna tvey ár frammanundan, men hesa mannagongd hevur Sørvágs kommuna ikki verið nøgd við, og fyri komandi ár hava vit gjørt eina avtalu um, at helvtin av fíggjarætlanini skal gjaldast eftir skattskyldugu inntøkuni fyri 1994, og hin helvtin eftir fólkatalinum í kommununum (28.11.95). Sostatt sær býtið fyri 1996 soleiðis út:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Sørvágs kommuna | kr. | 115.060,35 | Miðvágs kommuna | kr. | 117.068,16 |
| Sandavágs kommuna | kr. | 82.077,24 | Bíggjar kommuna | kr. | 7.658,82 |
| Mykines kommuna | kr. | 1.975,43 | | | |

Nevndin í Felagskommununi er: Hervør Guttesen - Bøur - form., Eivin Jacobsen - Sørvágur - , Marianna Simonsen - Miðvágur - , og Thurid Olsen - Sandavágur.

Av játtanini "Ung í arbeiði" fyri 1995 frá Føroya Landsstýri fingu vit fyrst 129.555 kr., og av tí at ikki allar kommunur søktu henda stuðul, fingu vit eina eykajáttan uppá 54.400 kr. Tað eru fimm ung í aldrinum 16 - 26 ár, sum eru við í tiltakinum "Ung í arbeiði 1995". Tað tey hava gjørt higartil er: steinlagda gøtu við ljósum í Húsadali (liðug) - laðing aftanfyri bussskýli á Blindtarminum (liðugt) -steinlagda gøtu við ljósum frá Kelduni og niðan á Úttriðingsvegin (ikki liðug) - laðing fram við vegjaðaranum á vegnum niðan móti portrinum í Húsadali (ikki liðugt). Haraftrat hava tey havt aðrar smærri uppgávur, sum koma undir vanligan rakstur.

Í samband við gøtuna millum skúlan og kirkjuna, íð var gjørd av teimum ungu í 94, hava vit eitt "hjartasuff". Framvið hesi gøtu standa sjey ljós, sum øll minst tríggjar ferðir eru skift út, vegna at tey eru sorlaði (herverk). Hetta skriv skal tí eisini verða ein áheitan á øll um at hjálpa til , at hesi ljós fáa frið.

Barnagarðurin "Sýslan" er sjálveigandi stovnur, íð verður stjórnaður av eini 5-mannanevnd. Í reglugerðini fyri stovnin stendur, at tveir nevndarlimir skulu veljast millum foreldur at børnum í barnagarðinum, og í desembur 95 er Sólva Hansen komin í nevndina fyri Astu Jacobsen. Nevndin sær í dag soleiðis út: Jógvan á Ørg - form., Sólva Thomassen, Jastrid Hansen, Herfríð Falkvard og Sólva Hansen.

Umfíggingin av kommunuskuldini: Føroya Banki hevur vegna allar kommunurnar í Føroyum samráðst við lánveitararnar um eina umfígging av kommunuskuldini. Hetta

hevur verið ógvuliga drúgt at bíða eftir, ja vit væntaðu næstan ikki, at nøkur loysn fekst, men loksins í oktobur var avtalan samtykt.
Í tí fimm ára skeiði, avtalan er galdandi, hevur kommunan tvinnar møguleikar - (eftir vali lángevaranna) at velja ímillum. **Annaðhvørt**: fasta rentu 9% p.a. og ongar avdráttir, **ella**: fast gjald 10% t.v.s. rentan er marknaðarrenta (skiftandi) + 1% p.a. og restin harfrá upp til 10% er avdráttur. Vit samtyktu at taka av seinnu loysnini, meðan endaliga loysnin frá lángevarunum var, at: Nykredit og Føroya Banki góvu okkum 10% loysnina, meðan Tryggingarnar góvu okkum 9% loysnina. Viðvíkjandi Komunekredit er avtalan 7% p.a. og bert renta. Hetta av at rentan her áðrenn umleggingina var 7% p.a., og avtalan sigur, at tey lán, sum høvdu rentu niðanfyri 9% p.a., varðveita somu rentu eftir at nýggja avtalan var undirskrivað. Lánini vóru uppgjørd pr. 30.11.95 og sóu fyri okkara viðkomandi soleiðis út:

| Land | Lánistovnur | Lánsupphædd | Alternativ (i)/(ii) | Lánsgjald/ mánaðarliga |
|---|---|---|---|---|
| Danmark | KommuneKredit | 95.809 | 7,0% | 559 |
| | Nykredit | 16.027.017 | 10,0% | 133.558 |
| | ***Danmark*** | ***16.122.826*** | | ***134.117*** |
| Føroyar | Føroya Banki | 8.269.604 | 10,0% | 68.913 |
| | Føroya Brunatrygging | 21.283 | 9,0% | 160 |
| | Føroya Lívstrygging | 3.086.868 | 9,0% | 23.152 |
| | Føroya Sjóvátrygging | 5.920.074 | 9,0% | 44.401 |
| | Føroya Vanlukkutrygging | 389.030 | 9,0% | 2.918 |
| | ***Føroyar*** | ***17.686.859*** | | ***139.543*** |
| ***Tilsamans*** | ***Sørvágs*** | ***33.809.685*** | | ***273.660*** |

Hvør kommuna kann umframt - um hon megnar tað - gjalda inn eyka upphæddir, men minsta upphædd er kr. 500.000, sum so verða deildar ímillum allar lánveitararnar í mun til skuldina.

Fíggjarætlanin fyri 1996. Sambært lóg frá Føroya Løgtingi er skattaprosentið hjá føroysku kommununum læst fast millum 16 og 23%, harav skulu allar kommunur seta 1% í ein kommunalan kreppulánsgrunn, sum við lóg er settur á stovn fyri at hjálpa teimum kommunum, sum hóast 23% í skatti ikki klára seg fíggjarliga + sum eitt veðhald yvirfyri tí samlaðu kommunuskuldini (eftir eini ávísari skipan).Sørvágs Kommuna hevur samanlagt í 94 og 95 goldið umleið 1,2 mill. í kreppulánsrunnin, og gjaldið fyri 96 verður umleið 500.000 kr.Endaliga fíggjarætlanin var einmælt samtykt á bygdaráðsfundi 29.11.95

| | 1996 | 1995 | 1994 |
|---|---|---|---|
| Skattskyldug inntøka | 71,5 mill | 73 mill | 68 mill |
| Skattaprosent | 20% + 1% | 22% + 1% | 22% + 1% |
| Barnafrádráttur | 2500 | 2500 | 2500 |
| Kirkjuskattur | 0,05% | 0,05% | 0,1% |

Skattainntøkan í 96 er mett til 12.173.500 kr. og við mettum samlaðum útreiðslum 12.117.088 kr. verður í 96 eitt avlop 56.412 kr. Rentir og avdráttir samanlagt í 1996 eru mettar til kr.3.328.627

Viðvíkjandi fólkatalinum er at siga, at vit frá síðsta kunningarskrivi 30.12.94 og til í dag eru fækkaði frá 913 fólkum niður í umleið 880 fólk. Hetta er minsta íbúgvaratal í nógv ár - - ja, vit skulu heilt aftur til 1957 fyri at finna á leið sama fólkatal. Tá búðu 888 fólk í Sørvági.

Aftur í ár var hetta ein roynd at kunna okkara bygdafólk um farna árið, og eru tað nøkur, íð sakna ella ynskja onkra ella meira vitan av almennum áhuga, ber til at venda sær til skrivstovuna.

At enda verður ynskt øllum bygdafólkunum eitt av Harranum vælsignað nýggjár í vónini um bjartari framtíðarvónir fyri okkum øll.

SØRVÁGS KOMMUNA
PETUR KRUSE
PETUR KRUSE, form.

***Hvar í verøld meg leiðin man bera***
***longsul sterkur meg dregur at tær.***
***Her á fold kærast fyri mær vera***
***skalt tú – Sørvágur – heimbygdin mín.***




Sørvágs Kommuna
Útreiðslubýti í 1995
Skúli og mentan (14,9%)
Felagsgjøld (3,2%)
Rentir og avdráttir (37,3%)
Almanna og heilsumál (17,4%)
Maskinur og amboð (1,6%)
Vegir og veitingar. (12,3%)
Renovatión (7,0%)
Fyrisiting o.a. (6,4%)


Skuld áðrenn og eftir umfigging
desember 1995
40.000
30.000
20.000
10.000
0
1.000 kr.
34.044
33.034
32.150
31.582
31.029
30.663
28.193
25.649
23.188
20.674
2.299
2.470
2.544
2.461
2.514
1.010
883
568
554
1996
1997
1998
1999
2000
Ár
Avdr. áðrenn umfigg
Skuld áðrenn umf.
Avdr. eftir umfigg.
Skuld eftir umfigg.